Ítróttur
e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:
**www.sosialurin.fo**

# Nú stendur nógv á

*B36 skal royna at endurvinna oddasessin, meðan vágbingar fegnir vilja gerast partur av oddastríðnum*

JÁKUP MØRK

Fyri fyrstu ferð í ár eru B36 leikararnir ikki á odda í landskappingini, tá teir sunnudagin fara á vøllin suðuri í Vági.

### Neyðugt við hvíld

Við sigrinum á Sumba fóru grannarnir úr HB nevnliga upp á ovastu rók, men við sigri í dag, kann B36 vinna hendan sessin aftur.

Uttan iva verður talan um ein strævnan dyst hjá havnarmonnunum sunnudagin, og tí verður saknurin kanska serliga stórur í teimum leikarum, sum ikki eru tøkir sunnudagin.

Talan er nevnliga um Mikkjal Thomassen og Bjarna Prior, sum báðir eru leikarar, sum vanliga ganga á odda, tá ein sigur skal stríðast til høldar. Bjarni er framvegis plágaður av skaða í lærkrikanum, meðan Mikkjal í longri tíð hevur spælt hóast pínu í hælsinuni.

B36 venjarin, Pelle Andersson, heldur tó, at tað í longdini man loysa seg best, at lata teir báðar hvíla seg nú, so teir fáa stundir at koma rættuliga fyri seg. – Eg vil heldur, at ein leikari fær hvíld í ein dyst, og vera førur fyri at spæla tíggju, enn at tað øvugta ger seg galdandi, sigur Pelle Andersson at enda.

### Vónar nógvar áskoðarar

B36 er tó ikki einasta liðið, sum ætlar sær at vinna í Vági sunnudagin. Krzystof Popzynzki sigur við Sosialin, at teir á heimaliðnum so sanniliga eisini ætla sær trý stig sunnudagin.

- Vinna vit dystin, eru vit við heilt frammi í oddinum, meðan eitt tap viðførir, at vit eru seks stig aftan fyri B36, sigur leikandi venjarin.

Harumframt vísir hann á, at ein sigur eisini vil hava við sær, at hugurin at venja í summarsteðginum helst verður rættuliga góður, at hetta kann koma teimum til góðar í seinnu kappingarhálvu, um so er.

VB venjarin, sum noyðist at verða leikbannaða Janus Kjærbo fyri uttan sunnudagin, vónar annars, at nógvir áskoðarar leita sær vestur á Eiðið sunnudagin. – Tá vit spældu móti GÍ fingu vit stóra hjálp frá áskoðarunum, og nú talan verður um oddadyst, vóni eg, at stuðulin frá bygdarfólkinum verður eins dyggur, sigur VB venjarin at enda.

Ellivu ár eru liðin, síðani seinasta heimasigurin hjá VB móti B36. Síðani tapið í 1989 hevur tað sostatt eydnast B36 at fáa stig burtur úr øllum vitjanum sínum á Eiðinum.



Ivaleyst verða bæði Jan og Jón Pauli týdningarmiklir leikarar í dystinum millum VB og B36

# Stevnuhýrurin skal varðveitast

*Sandoyingar hava vitjan av ungum miðvallara úr Danmark, men tað er ikki víst, at hann sleppur á liðið í dag*

Sandoyingar eru skemtingarsamir. Teir halda fyri, at tað verður synd í teimum í Runavík, tá B71 hevur verið við Løkin og oyðilagt stevnuhýrin. Stevnudysturin verður longu í kvøld og í NSÍ svara teir sandoyingum aftur við at siga, at teir skulu vera væl komnir at vera á stevnuni, sjálvt um teir hava tapt!

Hjá báðum liðunum er tað sera týdningarmikið at vinna. Trý stig fara at hava við sær, at vinnandi liðið kann kalla seg eitt slag av miðliði.

Hjá NSÍ, sum fegið vil halda seg í góða stiminum, teir kenna seg í eftir stórsigurin í Sumba, eru allir spælararnir tøkir uttan Ken Nónklett. Kanningar í vikuni hava víst at hann hevur spælt við brotnari tá. Staðfestingin av brotinum ger, at ungi maðurin hevur fingið summarfrí frá fótbóltinum.

### Fleiri ivasamir

Á Sandi hava teir vitjan av einum 20 ára gomlum dana. Hann er ættaður úr Esbjerg og er stutt síðani komin fyri seg eftir at hann hevur verið skaddur leingi. Hann skal royna seg á Sandi fram til summarsteðgin, men í gjár var ivasamt, um hann verður á liðnum ídag.

Hin danin á Sandi, Alex Nielsen, er skaddur og verður ikki við móti NSÍ. Rúni í Soylu spældi 2. hálvleik móti KÍ, men hann hevur ikki vant síðani, og teir ivast nógv í, um hann verður við í dag. Kári Nielsen hevur ikki vant í vikuni og hann verður neyvan við í kvøld.

Í fjør vann NSÍ 4-0 á heimavølli móti B71. Í 1997 og í 1995 vóru bæði NSÍ go B71 í 1. deild. Í 1997 vann NSí 3-0, meðan sandoyingar í 1995 vunnu 2-0.

# Breiddin er ov lítil

*Toftamenn fara skerdir til sarpisgerði, her teir vanliga hava tað sera trupult*

JÁKUP MØRK

Tað hevur fleiri ferðir í ár verið sagt, at størsti trupulleikin hjá B68 í ár er, at breiddin í hópinum er ov lítil. Nú er so líkt til, at hesi orð koma at standa sína roynd, tí eftir øllum at døma verða toftamenn rættuliga skerdir sunnudagin.

### Fleiri ivasamir

Jákup Eli Olsen og Fróði Benjaminsen eru báðir álvarsliga skaddir, og teir báðir vera so ikki tøkir, sigur B68 venjarin, Jóannes Jakobsen.

Harumframt er navnabrøðurnir, Jan Petersen og Jan Dam báðir ivasamir. Jan Dam hevur leingi drigist við skaða, og hevur ikki fingið vant við fullari ferð í einar tvær vikur, og Jan Petersen fekk ein snudd undir venjing hóskvøldið.

### Ongar skaðar

Gøtumenn hava fyri fyrstu ferð í ár ongar skaðar at dragast við, men kortini er ikki vist, at Johan Nielsen hevur allan leikarahópin tøkan í morgin.

Tá vit seinast fréttu, vóru bæði Magni Jarnskor og Hans Pauli Petersen sjúkir, so ikki bar til at siga, um nakar av teimum verður tøkur.

### GÍ hevur takið

Gøtumenn hava vanliga havt sera gott tak á Toftamonnum, sum bert hava vunnið eina ferð á GÍ seinastu mongu árini. Tað var í 1995. Annars hevur GÍ fyri tað mesta havt yvirtakið, meðan einstakir dystir eru endaðir við javnleiki.

# Trýst á klaksvíkingum

*Í Vágum verða teir væl nøgdir, um tað fer at eydnast teimum at fáa eitt stig burturúr ferðini til Klaksvíkar*

Í fyrrahvøldið legði HB seg á odda í landskappingini. KÍ vil fegið kappast við havnarliðini um meistaraskapin, og eftir góðu gongdina síðstu vikurnar hava teir ikki avskrivað møguleikan. Men um tað skal eydnast at hang auppií, so kunnu teir ikki kiksa í tí, sum á pappírinum sær út til vera lættir dystir.

FS Vágar tók plássiðí hálvfinaluni í steypakappingini frá KÍ. Dysturin í Klaksvík endaði við javnleiki og FSV vann brotssparkskappingina. Eitt sovorðið úrslit kann KÍ ikki brúka í landskappingardystinum í morgin.

Vágamenn, sum vunnu fyri fyrstu ferð í landskappingini síðsta leygardag, eru eitt sindur skerdir. Har vesturi dylja teir ikki, at teir høvdu verið hjartans fegnir, um teimum hevði eydnast at fingið eitt stig í Klaksvík.

Darius er leikbannaður, tí hann hevur fingið trý gul kort, Emil Hentze fór út ímóti GÍ, tí hann var skaddur og hann verður ikki við í morgin. Hannus Olsen er eitt sindur ivasamur.

### Stór kapping

Í Klaksvík er Niclas Niclasen leikbannaður eftir reyða kortið á Sandi. Ta ferðina spældi hann á høgra vongverja. Harley Bertholdsen var ikki tøkur í síðstu viku. Nú er veteranurin klárur sloppin av við vøddaskaðan. Arnold Joensen venur aftur við fullari ferð, og hann er við í kappingini um plássini. Á Sandi vardi Meinhard Joensen málið. Hann spældi seg ikki av, men nú er jugoslaviski málverjin tøkur aftur.

KÍ hevur spælt tríggjar heimadystir móti FSV. Í 1995 var málleyst, meðan KÍ vann stórsigrar í 1996 og 1997. Tá vóru úrslitini 4-0 og 6-0.

JH



Vágamenn vóru fegnir, seinast teir vóru í Klaksvík, og frøin verður ikki minni, um tað eydnast teimum at vinna sær stig sunnudagin



# Eysturoyingar plágaðir av sjúku

**Kappróður:** *Í fleiri bátastøddum verður roknað við, at kappingin verður ikki minni, enn hon var á norðoyarstevnu*



*Nýggi Vestmenningur vann 10-maanfarsróðurin á norðoyasteevnu, men hann fer væntandi at fáa harða kapping á eystanstevnu*

Seinnapartin í dag verður annar FM róðurin í hesum árinum. 57 bátsmanningar hava boðað frá luttøku á skálafjarðarstevnuni ella á eystanstevnuni, sum 40 ára gamla stevnan nú alment verður nevnd. Luttakaratalið er tað sama, sum tað var á norðoyarstevnu og í flestu róðrunum eru luttakandi bátarnir nett teir somu, sum teir vóru á norðoyarstevnu.

Eitt av teimum heilt fáu undantøkunum er, at 10-mannafarið Kjølur úr Kollafirði fer at rógva á Skálafjørðinum. Hann var ikki við fyri tveimum vikum síðani. Talið á 10-mannaførum verður kortini tað sama, sum tað var í Klaksvík. Klaksvíkingur, sum var klárt aftastur í heimasjógvi, er drigin í neystið, og tað er sera lítið sannlíkt, at hann verður at síggja aftur fyrrenn á norðoyarstevnu komandi ár.

Sambært kappingarskipanini hava 92 bátsmanningar boðað frá luttøku í kappróðrarárinum ár 2000. Luttøkan á norðoyarstevnu og aftur nú á Skálafjørðinum boðar tískil frá, at tað eru 35 róðrarmanningar, sum hava ætlað sær at tikið lut, men sum higartil hava meldað frá til teir báðar fyrstu kappingarnar. Á yvirlitinum í skipanini sæst, hvørjar tær 35 manningarnar eru, sum kanska hava ætlað sær at tikið lut, men sum ikki enn hava hildið seg til. Millum teirra eru fýra 10-mannafør: Suðringur, Tívil (gamli Nólsoyingur), Vestmannabáturin (gamli Vestmenningur) og Skálabáturin.

Tað kemur fyri, at sjálvt um bátar ikki eru við í øllum róðrunum og tískil ikki hava møguleika at kappast um FM, so megna teir at fyrireika seg væl til ólavsøkuna. Tað ber framvegis til hjá teimum, sum higartil ikki hava verið við, at vera við á ólavsøkuni, men nú skulu tær manningarnar skjótt vísa seg, sum ikki hava verið við higartil, men kanska ætla sær at vera við á ólavsøku. Reglarnir siga, at fyri at sleppa upp í part á ólavsøku, so skal bátur frammanundan hava verið við í minst trimum FM kappingum.

### Seingjarliggjandi

Tað er sjálvsagt spenningur um allar róðrarnar í dag. Vanliga er áhugin serliga stórur fyri 10-mannaførunum. Á norðoyarstevnu var kappingin millum 10-mannaførini tættari, enn hon var í nøkrum av hinum róðrunum. Tí er spenningurin serliga stórur fyri síðsta róðrinum í dag.

Ein av spurningunum er, um tað hesa ferð fer at eydnast nýggja Havnarbátinum at vinna. Hann var leingi fremstur á norðoyarstevnu, men á teimum síðstu tvey hundrað metrunum át nýggi Vestmenningurin seg fram á fyrsta plássið. Teinurin á Skálafjørðinum er tvey túsund metrar. Í Klaksvík róðu 10-mannaførini 1500 metrar. Tað vil við øðrum orðum siga, at treystleikin hevur stóran týdning.

Fyri tveimum árum síðani var talan um uppvísningsróður í heimasjógvi, tá Eysturoyingur so at siga einsamallur stevndi á mál. Á norðoyarstevnu tapti Eysturoyingur tann fyrsta av trettan róðrum, sum hann hevur verið við í. Tapið var serliga dygt, tí teir endaðu á fjórða plássi.

Í sambandi við norðoyarstevnuna søgdu vit, at teir á Eysturoyinginum hava verið óhepnir í ár. Tveir av manningini vóru skaddir stutt undan bygdarstevnuni á Skála. Annar teirra kom umborð aftur stutt undan fyrsta FM róðrinum, meðan hin framvegis gongur skaddur. Manningin á Eysturoyinginum hevur avgjørt ikki avskrivað seg sjálva í FM kappingini, men ir hava ikki havt optimalar umstøður undan róðrinum í heimasjógvi:

– Vit fingu ein nýggjan mann umborð fyrsta venjingarkvøldið eftir norðoyarstevnu. Eykamaðurin, sum var við í Klaksvík, hevði ikki umstøður at brúka so nógva tíð uppá venjingina, sum tað er neyðugt, um vit skulu hugsa um at vera millum teir fremstu. Men nú hevur tað verið neyðugt hjá okkum aftur at fáa ein eykamann umborð, og sami maðurin hevur tíbetur játtað at hjálpa okkum eina ferð afturat.

Hetta sigur Ludvík Justinussen. Hann er bátsformaður umborð á Eysturoyingi. At tað hevur verið neyðugt at fáa eykamann umborð til stevnuna í Runavík, kemst av, at tríggir av føstu monnunum í hesi vikuni hava verið seingjarliggjandi við krími og høgum hita. Bátsformaðurin hevur verið ein teirra, men tá vit fregnaðust hóskvøldið, var hann komin so mikið fyri seg aftur, at hann roknaði heilt víst við at vera við í dag.

– Eg veit ikki rættuliga, hvat hetta er. Onkrir av dreingjunum umborð á Tjaldrinum hava eisini verið eitt sindur illa fyri, men teir eru komnir fyri seg aftur.

Hví gekk so illa hjá tykkum á norðoyarstevnu?

– Sum tit áður hava sagt, so hava vit verið óhepnir í ár. At vit kortini halda okkum hava ein møguleika í dag, kemst m.a. av, at vit vita, at vit gjørdu eitt stórt mistak í Klaksvík. Eg fari ikki at siga, hvat mistakið var, men vit ætla ikki at endurtaka mistakið, og um vit sleppa undan tí, so haldi eg, at vit hava møguleika at blanda okkum upp í kappingina, sigur Ludvík Justinussen.

### Innanhýsis kapping

Í kappingini millum 8-mannafør var Argjabáturin fremstur so at siga allan teinin í Klaksvík. Í Runavík siga teir, at tað síðani á norðyarstevnuni hevur ligið væl fyri hjá Toftabátinum.

Í Norðlýsinum í síðstu viku segði Martin Venned, sum bæði í fjør og í fyrraárið var umborð á Eysturoyingi og sum nú er bátsformaður umborð á Nevinum Reyða í Klaksví, at hann avgjørt roknar við, at tað er meiri í teimum, enn tað, sum teir vístu í fyrstu kappingini. Nevið Reyða var nummar trý í Klaksvík. Sjálvandi hava argjamenn fyrireikað seg væl til róður í dag. Men ivaleyst verður róðurin spennandi.

Kvinnurnar umborð á Jarnbardi vóru so sannførandi í Klaksvík, og tað er ilt at síggja, hvagani mótstøðan skal koma. Tað varð roknað við nýggja Gongurólvi undan fyrsta FM róðrinum, men ta ferðina kiksaðu havnargenturnar.

Í kappingini millum 6-mannafør við monnum verður talan um innahýsis kapping í Sundalagnum. Hvessingur vann í Klaksvík, men hann fekk sera stóra mótstøðu frá Hósvíkingi, og eisini kollfirðingur vísti, at hann var væl við. Hesir tríggir bátarnir fara at liggja í miðjuni, tá startskotið í dag gongur av.

Vágagentur vóru nógv tær stinnastu í Klaksvík. Aftur í dag luttaka seytjan gentubátar. Frúgvin úr Miðvági liggur í miðjuni. Undir aðrar liðini fer hon at hava Beintu úr Miðvági, og undir hinari liðini fer Ørnin úr Sandavági at liggja.

Nýggja Tjaldrið vann sera sannførandi dreingjaróðurin í Klaksvík. Sum vit nevndu omanfyri, so hava onkrir av manningini verið eitt sindur sjúkir í hesi vikuni, men teir vera ivaleyst stinnir í dag, tá teir fara at gera eina nýggja roynd at verja heiðurin hjá róðrarfelagnum NSÍ. Størstu kappingina fara teir at fáa frá FM vinnaranum frá í gjør, Havfrúnni úr Vestmanna, og á Norðoyarstevnu vísti Kollur úr Kollafirði, at teir ætla sær at verða uppií, har tað gongur fyri seg.

Startdómarar í dag eru Kristian Martin Joensen og Martin Berg meðan Trúgvi Johansen er høvuðsdómari.

JH

## Dystirnir um vikuskiftið

**1. deild menn, 9. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 17.06 | NSÍ-B71 | Suni Johansen |
| 18.06 | KÍ-FS Vágar | Kim Ejdesgaard |
| 18.06 | GÍ-B68 | Birgir Sondum |
| 18.06 | VB-B36 | Petur Reinert |

**2. deild menn, 8. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 17.06 | TB-KÍ | Tommy O. Joensen |
| 17.06 | LÍF-GÍ‘ | Petur Hans Joensen |
| 17.06 | B36-HB | Eiler Rasmussen |
| 17.06 | ÍF-EB/Streymur | Petur Reinert |
| 17.06 | NSÍ-Royn | Regin Egholm |

**3. deild menn, 9. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 18.06 | KÍ-FS Vágar | Hjalti Gleðisheygg |
| 18.06 | ÍF-B68 | Sunleif Álaberg |
| 18.06 | VB-B36 | Zoran Mancic |
| 18.06 | AB-TB | Jóhann Krogh |
| 18.06 | Skála-B71 | Ransin N. Djurhuus |

**Kvinnudeildin**

| | | |
|---|---|---|
| 17.06 | HB-Sumba | Georg Rasmussen |
| 17.06 | VB-AB | Páll Augustinussen |
| 17.06 | Skála-GÍ | Dia Lamhauge |
| 17.06 | KÍ-EB/Streymur | Allan Joensen |
| 17.06 | NSÍ-B36 | Rúni Gaardbo |

* Hava býtt um heima- og útivøll

## Støðan, 1. deild menn

| | | d | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 9 | 6 | - | 2 | - | 1 | 20 | 10 | 10 | 20 |
| 2 | B36 | 8 | 6 | - | 0 | - | 2 | 30 | 12 | 18 | 18 |
| 3 | VB | 8 | 4 | - | 3 | - | 1 | 18 | 13 | 5 | 15 |
| 4 | B68 | 8 | 5 | - | 0 | - | 3 | 18 | 14 | 4 | 15 |
| 5 | KÍ | 8 | 4 | - | 2 | - | 2 | 21 | 6 | 15 | 14 |
| 6 | NSÍ | 8 | 2 | - | 2 | - | 4 | 17 | 16 | 1 | 8 |
| 7 | GÍ | 8 | 2 | - | 2 | - | 4 | 13 | 17 | -4 | 8 |
| 8 | B71 | 8 | 2 | - | 1 | - | 5 | 8 | 13 | -5 | 7 |
| 9 | Sumba | 9 | 2 | - | 0 | - | 7 | 6 | 39 | -33 | 6 |
| 10 | FS Vágar | 8 | 1 | - | 2 | - | 5 | 8 | 19 | -11 | 5 |